# SPYRST SO LIVST

## RIGMOR DAM

Tríbarnamamma, kona, lærari, journalistur og redaktørur á lívsstílsblaðnum *Rákið* svarar spurningum til brævkassan **SPYRST SO LIVST**



Hevur tú brúk fyri einum góðum ráði, so send spurningin til:

**Sosialurin**
**SPYRST SO LIVST**
**postboks 76**
**FO-100 Tórshavn**

**ella teldupost til**
**rigmor@sosialurin.fo**

*Redaktiónin loyvir sær at velja og vraka millum innsendu spurningarnar*

## Tey klemmast og bítast

**Til Brævkassan**

*Stórasystir mín býr saman við einum sjeiki, og teirra forhold er so snedigt, at ongin skilir, at tey longu hava verið saman í fleiri ár. Eg havi ongantíð hoyrt tey siga eitt pent orð við hvønn annan, og serliga haldi eg, at hon fer so illa við honum. Vit í familjuni øtast um, at hann finnur seg í tí. Hon niðurgerð og flennir eftir honum, eisini tá vit onnur eru inni. Hon vil ikki hava, at hann ger ítrótt, sum honum dámdi so væl at gera fyrr. Eg veit eisini, at hon hevur onkrar mannligar vinir, sum hon ger hann jaloux við.*

*Men hann er heldur ikki altíð so fittur við hana. Ofta fer hann í býin og er vekk í dagavís. Tá hann kemur aftur er ballada. Meira enn eina ferð er hon farin á sjúkrahúsið ella til læknan, tí hann hevur sligið hana. Eisini hevur politiið verið inni hjá teimum og skilt tey sundur. Men eg má siga, at eg onkusvegna forstandi hann, tí hon uppførir seg so ljótt móti honum, og eg prísi meg lukkuliga fyri, at tey ikki kunnu fáa børn saman. Men hon er systir mín og eg vildi ynskt, at hon hevði eitt betri lív, men eg veit ikki, um hon dugir at elska ordiliga. Hvat heldur tú, eg skal gera?*

***Vinarliga eitt vitni***

**Góða vitni**

Tú sigur, at systir tín uppførir seg so ljótt móti manninum, at tú væl skilir, at hann smyr hana av viðhvørt. At hon gevur honum orsøk til at vera sjalu, og at hon tosar ljótt og niðrandi við hann, tá fólk eru til staðar.

Vit kenna hesi parløgini, har partarnir hava eitt óskiljandi maktspæl koyrandi í áravís. Her hon (sum oftast er tað kvinnan) spælir martýrur og er »omanfyri« í gerandisdegnum, tí tað er sooo synd í henni, at hann er so ljótur, tá hann hevur drukkið. Tá krýpur runt sum ein bukaður hundur og orsakar at hann er til. So knappliga fær hann nokk. Drekkur seg skít, flippar út og bukar hana sundur og saman. Aftan á skammast hann, grætur og biður um umbering, og so er hon »ovenpå« aftur – til næstu ferð hann ikki orkar at ganga kropin longur.

Og soleiðis gongur spælið, aftur og fram í áravís. Tey mussast og høggast og elskast og skeldast og psyka hvørt annað niður í svartasta myrkrið, har tey til endans ikki hóma ljósið longur. Vit hoyra enntá um hesi pørini, at sexlívið er ongantíð so gott, sum aftan á eitt ordans slagsmál. Og hon kundi ikki droymt um at farið frá honum, tí hon vinnur so nógv, við at hava hann í stuttum tjóðri til dagligt.

Ja, kærleikin hevur nógv andlit. Summi vakrari enn onnur. Hetta er eitt løgið og fløkjasligt psykologiskt mynstur, sum tey hava vant seg við. Og eg dugi ikki at síggja, hvussu tú, sum bara ert ein vanlig kona, kanst hjálpa systur tíni úr parlagnum. Tað má hon sjálv velja, og tá kanst tú vera har fyri hana. Men, av umsorgan kanst tú, við jøvnum millumbilum, minna hana á, at hatta er ikki uppbyggjandi, og at tey bæði tvey hava uppiborið betri. Forklára hana, at tú upplivir tað sum, at tey bæði tvey fremja harðskap móti hvør øðrum, men á hvør sín hátt. Spyr inn til, hvat hon sjálv følir, og eggja henni/teimum til at fara í parterapi ella til familjuráðgeva. Tí tað er so synd, um tey velja myrkrið fram um ljósið.

Tit avvarðandi skulu eisini staðiliga frábiðað tykkum at hoyra upp á hennara niðrandi viðmerkingar um mannin, tá hann er til staðar. Soleiðis kunnu tit vera við til at steðgað tí partinum av atburðinum, har tit eru vitni, og soleiðis eisini viðspælarar, til niðrandi atburð hennara.

***v. rigmor***

## Hvussu verið eg djarvari?

**Góða Rigmor**

*Eg elski at lesa tín brævkassa. Nú fari eg at vita, um tú kanska kanst hjálpa mær við einum. Eg eri mitt í tjúgunum og havi altíð verið ein still og smæðin typa. Nú føli eg, at hetta forðar mær í at fáa tað, sum eg ynski mær. Vinkonurnar langa bara til og fáa alt, t.d. sjeikar, arbeiði og útbúgving. Eg kundi hugsað mær ein ávísan sjeik. Men eg tori ikki at royna eftir honum. Eg havi eisini leingi ætlað at søkt inn á eina ávísa útbúgving í Danmark, har ein skal klára eina ringa upptøkuroynd. Men eg tori ikki, og tí havi eg heldur ikki søkt inn í ár. Eg útseti alt til síðstu løtu, ella til tað er ov seint, og eg eri so bangin fyri at blíva fyri skommum. Men eg tími ikki at vera so einglaslig altíð, tí tað hemmar meg so nógv. Hevur tú nøkur hugkot til, hvussu eg verið meira djørv?*

***Blíðar heilsanir »ein sum vil tora betri«***

**Góða tú**

Ja, tað er farligt at liva. Tað kunnu vit skjótt blíva samdar um. Tí tú kanst jú altíð endað við at blíva vónbrotin, avvíst ella at miseydnast. Øllum hesum ert tú tryggjað ímóti, um tú bara velur tað kenda og trygga. Tað veldst eisin um lyndi - um tú ert djørv og líkatil av natúr, ella um tú kanska ert meira varin av tær. Bæði eru líka góð, bara tú ert eitt gott menniskja og nøgd við teg sjálva og lívið sum heild. Tí vit eru øll so ymisk.

Men tú sigur, at tú ert ikki nøgd. At tú kennir teg tarnaða, tí tú ert so smæðin og at tú torir ikki at lofta møguleikunum, tá teir eru har. Hetta, at tú altíð útsetir uppgávur til í síðstu løtu kundi bent á, at tú krevur ov nógv av tær sjálvari, at tú ert perfektionistisk. Tí ert tú eisini bebbarødd fyri ikki at gera tingini nóg gott, at verða avvíst ella at uppliva niðurløg. Tí skalt tú royna at venja teg við at taka tað meira róligt. Lær at siga »aja, gotter - ongin er deyður«. Spyr teg sjálva, hvat er tað ringasta, sum kann henda. Tað er ongantíð verri enn, at tú missir andlit, og tað er also ikki heimsins undirgangur, tí tú ert bara eitt menniskja, og ongin er lýtaleysur.

Tú kanst gera eina venjing, har tú venur teg til at »missa andlit« hvønn dag, bara eitt lítið sindur í senn. Byrja í tí smáa, og tamba so mørkini so við og við. Far út í einum løgnum hatti. Klaga um eina vøru. Bríksla eftir einum sjeiki, sum tú koyrir framvið. Murra ein sang eitt sindur ov hart.

Tín styrki er hvørki títt kyn, tínir førleikar, títt upphav ella tín útsjónd, men mátin tú hugsar um tey sjálva uppá.

Vilt tú liva, so skal tað also vera nú – tí lívið verður ikki endursent!

***v. rigmor***

# Málnormur

Málstrikan – MÁLFELAGIÐ

Ein fyrispurningur til Máltænastuna ljóðar soleiðis: Hava tit einki gott at siga um tað føroyska, sum nú verður brúkt?

Jú sanniliga. Nógv duga væl at formulera seg, og viðhvørt kann tað vera ein sonn frøi at lesa snøgt og beinrakið og gevandi føroyskt.

Til dømis í Sosialinum (Vikuskiftið) fyri tann 14. november. Har eru ikki minni enn tvey sera vælskrivað bókaummælir. Anna V. Ellingsgaard ummælir »Rimlar hugans« eftir Einar Már Guðmundsson, og Hanus Kamban skrivar um romanina »Náttin í Lissabon« eftir Erich Maria Remarque. Bæði ummælini vísa, at tann skrivandi hevur góða litterera vitan og dugir at brúka málamboðið. Tað er eitt njótilsi at lesa væleydnaðar formuleringar. Hanus Kamban skrivar milllum annað: »*Náttin í Lissabon* hevði ikki verið tað lesiupplivilsi, hon er, um týðingin ikki var vandaliga gjørd. Vit føringar nema vanliga við henda partin av slíkum verkum av teirri einfeldu grund, at eingin enn hevur megnað at orðað okkum ein málnorm. Og tó liggur lykilin til ein slíkan norm – ta smidligu miðkósina, beint yvir talumálinum – dygst fyri okkara fótum...« Hanus rósar Ásu Højgaard Ellefsen fyri umsetingina og leggur afturat: »Hon hevði verið uppaftur betri, um orð sum 'føla' og 'lukta' (neyðug undir liðini á 'kenna' og 'rúka') vórðu brúkt nakað oftari, og um kenniorðs-syntaksurin varð, ikki bara sum her lutvís brúktur, men fullførdur í bókini«.

*(MT)*